OVASTEVNA

# STEVNAN SETT Í



*Elin Lindenskov, forkvinna í Umhvørvisnevndini*

Klokkan tvey setti leygardagin Elin Lindenskov, forkvinna í Umhvørvisnevndini í Tórshavnar býráð, ovastevnuna í allarbesta veðri.

»Sum barn svam eg nógv í gamla uttandura svimjihylinum í Gundadali. Eg dugdi væl at svmija. Av tí sama havi eg ofta staði í vindeyganum í mínum barndómsheimi og droymt um at svimja út til Nólsoyar«.

Millum annað hesi orð segði Elin Londenskov í síni setanarrøðu á ovastevnu fyrr í dag. Og hon helt fram um sína hugtøku av Nólsoynni.

»Sjálvt um teinurin út til Nólsoyar er stuttur,so skuldu ganga 15 ár, áðrenn eg fyrstu ferð vitjaði í oynni. Tað var við motorbáti, Síðani tá havi eg fleiri ferðir vitjað í Nólsoy«.

Hon kom eisini inn á orkustøðuna og segði um (vónandi) komandi svikjihyin í Nólsoy:

»Svimjihylurin í Nólsoy verður kanska fyrsti svimjihylur í landinum, sum verður hitaður við avlopsorku frá vindmyllum ella aðrari varandi orkukeldu«.



## OVASTEVNA STØRSTA TILTAK EFTIR ÓLAVSØKU

*– Í míni verð er Ovastevnan okkara størsta tiltak eftir ólavsøku, og eg havi altíð roynt at verið við, tí stevnan er so serstøk, og upplivingarnar eru so øðrvísi og spennandi. Tað sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, sum Nólsoy eisini er partur av. Sum borgarstjóri í kommununi bjóðar hann øllum - bæði nær og fjar - vælkomnum til Nólsoyar at halda Ovastevnu. Hann vísir á, at tað, at koma til Nólsoyar er sum at koma í ein annan heim. - Blíðskapurin er øgiligur, og upplivingarnar eru nógvar, sigur borgarstjórin, Heðin Mortensen.*



## SØGAN UM OVA Í LEIKI

*Klokkan fýra sýndi Nicolai Falck fram leikin um Ova í bátinum Diana Victoria á keiini í Nólsoy. Søgd var øll søgan - í stuttum sjálvandi - um lívið hjá Ova. Hvussu hann vaks upp, fyrst úti á Malarenda, síðani á Botni og at enda á Bátatúgvuni. Vit hoyrdu, hvussu barnaárini gingu, og vit hoyrdu, at hann fór til skipa við pápa sínum longu 14 ára gamal. Eisini varðsagt frá tíðini umborð á skúlaskipinum, Danmark, og hvussu hann var har umborð í seks ár. Vit hoyrdu, at skiparin á Danmark forerdi eina máttu burtur til Knút, prins, sum Ove hevði gjørt og sum hann ætlaði mammu síni. Eisini var greitt frá einari [illegible] knútum, sum Ove hevði gjørt, og sum nú hongur á skipskontórinum hjá Danmark. Og ikki minst hoyrdu vit um tær tríggjar ferðirnar, hann gjørdi um hav, har tær tvær fyrstu gingu til Hetlands, meðan tann triðja gekk alla leiðina til Langelinje. Ein hugnalig løta á keiini í Nólsoy*



## STOKTU GRINDABÚFF

*Á ovastevnu, sum verður hildin í besta veðri í Nólsoy í kvøld, er eisini bátahugni. Tá in.fo var ein túr eftir bryggjukantinum fyri løtu síðan, høvdu hesi í bátinum úr Kollafirði stokt sær grindabúff. – Kokkurin umborð stokti fyrst neytabúff, men tað miseydnaðist. Búffurin kundi ikki etast. Heldur ikki skipshundurin skoytti um búffin. Tað sigur Levi Danielsen, ið líka sum er skipari á bátinum, nú tey eru komin út til Nólsoyar at hugna sær á ovastevnu*